SJÚKRAHÚS VERKIÐ

Til veitarar

Klaksvíkar Sjúkrahús tørvar nýggjan buss til tveir koyristólsbrúkarar.

Meginreglan er at allir bilar hjá landinum skulu verða el drivnir, og tað halda vit okkum til. Vísir tað seg, ikki at bera til at fáa ein nøktandi el drivnan, so hevur bensin/diesel áhuga.

Klaksvíkar Sjúkrahús biðjur tí veitarar um geva tilboð uppá el-, bensin og diesel buss.

Treytirnar eru fylgjandi

- Bussurin skal nýtast í samband við borgarar sum fáa eina tænastu frá Klaksvíkar Sjúkrahúsi
- Bussurin skal veitast umbygdur við innvendigari lyft
- Hæddin í rúminum har ið koyristólar eru skal verða minst 170 cm
- 4 hjólstrekk
- Aut. gear
- Oljufýring
- EL-trin við skjótuhurð
- Skinnarar til fast setan av koyristólum
- Trygdarbelti 3 punkts
- 4 stk klap/fold setur aftan
- Vetrardekk  + alufelgur
- Tónaðar rútar aftan
- Bussurin skal hava einkult setur framman
- Bussurin skal eisini nýtast til at koyra millum bygdir í øllum veðri, og tí skal bilurin verða egnaður til tað Her verður hugsa um motorkraft og koyrieginleikar
- Støddin á bussinum skal verða H2/3 og L3
- Litur: Bussurin skal verða koksgráður/myrkagráur
- Bilurin skal skrásetast sum neyðsendaraakfar. MVG, virðisgjald og skrásetingar upphædd skal upplýsast
- Levering: Bussurin skal leverast til Klaksvíkar Sjúkrahús, seinast í Mars mánaði 2026

Keyparin tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnu tilboðini eins og ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum.

Tilboðini verða viðgjørd og sammett av keypara. Niðurstøðan um, hvat av tilboðunum – um nakað – tikið verður av, verður grundað á eina heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum eru nevnd í hesum skrivi.

Sum meginregla leggur Klaksvíkar Sjúkrahús seg eftir at keypa bíligasta bilin. Tó loyva vit okkum, at taka av einum dýrari bili, um Klaksvíkar Sjúkrahús fyri ein minni prísmun fær ein betur bil, í mun til góðsku og endamál.

KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS
Sjúkrahúsbrekka 1
FO-700 Klaksvík
Tel.: +298 45 45 45
ks@ks.fo
ks.fo

Soleiðis vera tilboðini vektaði:

- Prísur 60 %
- Egnaður til endamál 20 %
- Góðska 20%

Umboð frá veitara eru vælkomin at seta fram spurningar um veitingarætlanina og tilboðsgrundarlagið í síni heild, um ávís viðurskifti ynskjast greinað nærri. Slíkir spurningar skulu so vítt møguligt verða settir fram og annars viðgjørdir skrivliga við tí fyri eyga lættari at kunna skjalprógva samskiftið.

Spurningar skulu vera skrivligir og sendast til allan@ks.fo. Spurninganir verða síðani viðgjørdir og svaraðir í seinasta lagi mánadagin 24. novembur 2025 kl. 10.00. Øll, sum hava latið tilboð inn, fáa svar um niðurstøðuna av spurning. Keypari metir seg kunna geva svar, um tikið verður av tilboðnum ella ikki, umleið 1-2 vikur, eftir at tilboðsfreistin er farin.

Tilboðini skulu verða Klaksvíkar Sjúkrahúsi í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 28. novembur. 2025 kl. 10.00.

Tilboðið skal sendast við telduposti til allan@ks.fo